# Kvívík í fokus

Mikudagin verður Oyggjablaðið aftur í Sosialinum. Her kanst tú millum annað lesa um:



**Gunnvá: Deiliga bygdasligt í Kvívík**



**Borgarstjórin: Lítil bygd við øllum hentleikum**



**Nýggjur barnagarður og fegin børn**



**Lítil bygdahandil á alnetinum**



**Hús nr. 150**



*– Tað var øgiliga spontant, at eg bleiv strippari. Mest sum frá einum degi til annan. Eg hevði ongantíð sæð eitt strippshow í mínum lívi, men knappliga fekk eg eitt hugskot um, at eg vildi til Danmarkar at verða strippari, sigur Victoria Wild*

*Mynd: Jojofoto.dk*

# Sjónvarpið fylgir føroyskum strippara

**STRIPPARI** Sjónvarpið hjá Kringvarpinum hevur fylgt føroyska stripparanum Victoriu Wild til arbeiðis. Sending um hana verður at síggja í Sjónvarpinum í næstu viku.

Eyðun Klakstein

Í nøkur ár hevur føroyska Victoria Wild arbeitt sum strippari í Danmark, og í fjørsummar var hon í Føroyum og undirhelt. Hon strippaði á náttklubba í Havn og brúkti millum annað føroyska tjóðarbúnan í sínum showi.

Tá segði Victoria Wild soleiðis við Sosialin um at strippa í føroyskum búna:

– Síðani eg byrjaði at strippa, havi eg havt eina ætlan um, at eg fara til Føroya at strippa í føroyskum klæðum. Fýra ár seinni er tað veruleiki. Eitt ella annað stað eri eg nokk so stolt av at verða føroyingur, og eg eri ikki flov at verða strippari. Tað kann verða, at fólk taka hetta illa upp, men eg síggi einki galið við tí. Hvat er galið við einum flottum, naknum kvinnukroppi í føroyskum klæðum.

Sjónvarpið fylgdi Victoriu Wild til arbeiðis í Føroyum, og Sjónvarpið hevur eisini gjørt upptøkur við henni í Danmark.

## Til Danmarkar at strippa

Victoria Wild sigur soleiðis um, hvussu hon bleiv strippari.

– Tað var øgiliga spontant, at eg bleiv strippari. Mest sum frá einum degi til annan. Eg hevði ongantíð sæð eitt strippshow í mínum lívi, men knappliga fekk eg eitt hugskot um, at eg vildi til Danmarkar at verða strippari, sigur hon.

– Eg dugi ikki at siga, hvar hugskotið kom frá, men eitt ella annað stað havi eg havt hug at gera tað, og so gjørdi eg tað. Eg ringdi til eitt stripparabureau í Danmark, og tey skaffaðu mær upplæring. Eg gekk til undirvísing í tveir mánaðir, áðrenn eg var til reiðar at fara út stripppa.

Sendingin um Victoriu Wild verður at síggja í SvF hóskvøldið 20. januar.

*eydun@sosialurin.fo*

# Familjan hjá Løkke ansar væl eftir

**DOKUMENTAR** DR2 sendir í kvøld dokumentarsending um familjuna hjá Lars Løkke Rasmussen. Dóttirin Lisa greiðir frá, at hon ansar væl eftir, hvat hon ger.

Eyðun Klakstein

Dokumentarsendingin Ein heilt vanlig óvanlig familja, sum DR2 sendir í kvøld, fylgir familjuni hjá Lars Løkke Rasmussen. Danski forsætisráðharrin er giftur føroysku Sólrun Jákupsdóttir, og tey eiga trý børn.

Tey greiða øll frá, hvussu familjan hevur tað við øllum tí, sum fylgir við at pápin er forsætisráðharri. Løgreglufólk og PET-agentar eru um familjuna 24 tímar um døgnið, forsætisráðharrin er støðugt í brennideplinum, og samstundis skulu tey hava eitt familjulív at virka.

Familjan verður noydd at ansa væl eftir, hvat tey gera, og tað greiðir dóttirin Lisa millum annað frá.

– Eg ansi eftir, hvat eg sigi og geri, og hvar eg eri, so eg ikki fái trupulleikar. Beiggi mín var til eina hermannaveitslu, og so komu myndir av honum fyrst á Facebook og seinni í miðlarnar. So eg havi fingið allar býttisligar myndir av mær strikaðar á Facebook, sigur 15 ára gamla Lisa.

– Vinkonurnar hjá mær vita eisini, at eg havi nakrar avmarkingar og má ansa betur eftir, enn um mamma og pápi min arbeiddu í Super Best, sigur hon.

Sendingin um familjuna hjá Løkke og Sólrun verður at síggja á DR2 í kvøld kl. 20.20.